




# Megastórt úrval av jólagávum

Handlarnir Berglon í Runavík, Berglon í Klaksvík og Frú C í Havn, sum hoyra til sama felag, hava hópin av gávuhugskotum at bjóða sínum kundum til jóla.

Í Berglon í Runavík eru tríggir dygdarhandlar savnaðir á einum stað – nevniliga leikabúðin LEIKA, gávubúðin GÁVAN og útgerðarbúðin TEYMAR. Eisini er Berglon í Klaksvík við handlunum báðum LEIKA og TEYMAR.

LEIKA er staðið hjá barninum. Har finnast allar góðar leikur, ið ynskjast kunnu, bilar, bátar, dukkur, perlur og so øll spølini og alt tað nýggja, sum stimbrar og gleðir barnsins hjarta. – Her búgva eisini Leika og Leiki, sum elska at spæla við børnini, tá ið ymisk tiltøk eru á skránni.

TEYMAR er ein fjølbroyttur handil, ið hevur alt frá útgerð og klæðir til sjómannin og arbeiðsmannin til ullint pløgg og frítíðarklæði til hennara, hansara og børnini. Her eru tráður og húkar og øll neyðug pløgg til arbeiði og frítíð. Vøran er fyrstafloks, so einfalt er tað, sigur Eyðvør Berg leiðari í handlunum.

GÁVAN er handilin hjá teimum, ið ynskja góðsku og vakurleika í heiminum. Vit bjóða eitt breitt úrval av klassiskari dygd og nýggjum sniði – alt frá baðirúmslutum, køksbúnýtum og prýðislutum.

Berglon bjóðar tískil álítandi vørur til alla familjuna. Hóast nógvar handlar á einum stað, hava vit hugsað um tey, ið koma inn við barnavognum, koyristólum o.a. og gjørt tað lætt hjá teimum at ferðast frá einum handli til ein annan við m.a. lyft í Runavík.

FRÚ C er handilin hjá okkum í Havn, sum somuleiðis eisini er handilin til tey, ið ynskja góðsku og vakurleika í heiminum. Høvuðsmerkini, sum Frú C selur, eru tey vælumtóktu merkini House Doctor og Green Gate, sigur Eyðvør Berg leiðari í Berglon og Frú C, sum bjóðar øllum vælkomin at síggja stóra úrvalið av vørum.

# Hetta er mín jólasangur

## Sólrun Michelsen:
## *Nú ringja kirkjuklokkur so hátt*



**SØGA**

***– Mær tykti, at teir flestu jólasálmarnir høvdu vøkur løg, men lurtaði eisini væl eftir orðunum, tí var eg heppin, so var ein søga har, sigur Sólrun Michelsen***

- Ringt er at velja ein jólasálm burturúr. Mær dámar best lagið hjá Weyse "Julen har bragt velsignet bud", men eg haldi, at eg kortini velji nr. 99 í sálmabókini: "Nú ringja kirkjuklokkur so hátt", sigur Sólrun Michelsen úr Havn.

Tá eg var barn, hildu vit jóladag saman við farbróður og hansara familju. Henda eina dag í árinum sluppu vit at koyra í hýruvogni. Tað var eitt upplivilsi av teimum stóru. Vit blundaðu upp á skift og gittu so, hvussu langt vit vóru komin. Heima hjá farbróður var so hugnaligt, men besta løtan var, tá vit øll dansaðu um jólatræið.

Vit sungu fyrst nakrar føroyskar jólasálmar og so nakrar danskar eisini. Tá kom altíð eitt serligt smíl fram hjá teimum eldru. Tey sungu av hjarta, og eyguni gjørdust eitt sindur fjar.

Mær tykti, at teir flestu sálmarnir høvdu vøkur løg, men lurtaði eisini væl eftir orðunum, tí var eg heppin, so var ein søga har. Serliga hasi trý ørindini nr. 3, 4 og 5 settu seg føst. Eg sá fyri mær, hvussu Jesuspápi stríddi seg fram gjøgnum myrkur og storm, sum ýldi í gjáum. Sjálv var eg ógvuliga myrkarødd.

Hvørki ísur í skorð ella brim við strond kundu forða honum at koma til ta fátæku smáttuna við jólagávum.

Vit høvdu ikki nógv sjálvi, men har vóru tey fátæk. Hann var blíður við ta gomlu ommuna og kíndi barninum um kjálkan.

Og so kom tað mest týdningarmikla: Tá gleðin dalaði niður av himli. Hendan gleðin var í mínum barnahuga altíð stórar, stillar kavaflykrur.

- Tað er hon enn, sigur Sólrun Michelsen.

*Nú ringja kirkjuklokkur so hátt*
*við himmalskum gleðiljóði:*
*Tað stundar móti jólanátt,*
*tá Jesus varð føddur hin góði.*

*2. Nú boðast friður víða um lond,*
*nú verður hin sjúki grøddur,*
*nú losna hørðu syndabond,*
*tí Jesus í nátt varð føddur.*

*3. Tó myrkur fyllir dalar og skørð,*
*og stormurin ýlir í gjáum,*
*so fjakkar Jesus enn á jørð*
*við sínum jólagávum.*

*4. Ei brim við strond, ei ísur í skor*
*kann Jesusi forða vegin;*
*hann stígur inn for fátæks mans borð,*
*har lítil er jólagleðin.*

*5. Ja, Jesus fer í smáttuna inn,*
*blíð orð hann við gomul talar,*
*hann klappar bleiku barnakinn,*
*av himni tá gleðin dalar.*

*6. Um sorgin veg til hjarta títt fann,*
*vár Jesus teg aldri gloymir,*
*og jólaboðið grøða kann*
*ta sótt, tú í barmi goymir.*

*7. Vit ung og gomul halda nú jól,*
*vár Jesus vil øllum hýsa,*
*hann er hin bjarta lívsins sól,*
*um allar ævir skal lýsa.*

*8. Í Betlehem tann sólin upp rann,*
*um heimin hon út mundi leita,*
*at Føroya smáttum veg hon fann,*
*tí tøkk vit tær, Jesus, veita.*

*9. Øll ung og gomul, samlist nú brátt*
*og lýðið á gleðiljóðið:*
*Tað var um halgu jólanátt,*
*at Jesus varð føddur hin góði.*

*Símun av Skarði*